# FCK leitar eftir góðsku

Donsku meistararnir hava leingi latið ljóðað, at teir skulu hava stóran styrk í summar. Hetta váttar nú venjari teirra, Ståle Solbakken. – Tað hevur ongnatíð verið verri at fingið styrkin, sum nú. Vit hava havt møguleikan at fingið 20 leikarar, men vit hava valt at vera tolnir og bíða eftir røttu leikarunum. Hetta borgar fyri at vit vilja hava góðsku, sigur norski venjarin í FCK, Ståle Solbakken, við B.T.



# Robinho skoraði hattrick

Brasilia er komið aftur á rættkjøl, eftir at teir í Copa America løgdu út við at tapa fyri Meksiko. Uppreisnin kom í gjár, tá ið teir vunnu sannførandi 3-0 á Kili. Bóltsnillingurin Robinho skeyt øll trý málini. Brasilia manglar nú Ekvador í seinasta bólkadystinum, og her skal nógv henda, áðrenn teir skulu missa møguleikan at koma víðari.

# Fantastiskar umstøður men keðiligt úrslit

**Soleiðis ljóðar samandrátturin hjá Hera Ziska, eftir at hann í gjárkvøldið tveitti hamaran knappar fýra metrar**

**HAMARKAST**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Heri Ziska hevur fingið sær venjara. Hetta er hansara fyrsti í 13 ár, og Heri vónar at hesin kann hjálpa honum at røkka teimum 50 metrunum, sum er málið til komandi oyggjaleikir*

*Mynd: Rólant Waag Dam*

Hamarkast er ikki sterkasta síðan hjá Hera Ziska, men á einum góðum degi ber til hjá honum at tveita hamaran upp á 47 metur. So væl gekk tó ikki hjá honum seinnapartin sunnudagin, tá hann á leikvøllinum fyri frælsan ítrótt á Kallipateira skamt uttan fyri Rhodos-bý, kastaði hamaran 43,99 metur. Eitt tal, sum í síðsta enda gav eitt fimta pláss.

– Eg eri nokkso ræðuliga skuffaður, tí eg veit eg havi meiri at geva av. Eg klári væl meiri á einum góðum degi, og hevði gjørt dreymakastið nú, so hevði tað kanska rokkið til eitt triðja pláss, segði Heri Ziska, stutt eftir at hann hevði tveitt hamaran fyri seinastu ferð á hesum leikunum.

### Veðrið bilti ikki

Tá Heri kastaði fyri fyrstu ferð í gjár skein sólin yvir stadion. Tá hann var liðugur, hevði sólin fjalt seg handan skýggini, og sambært Hera varð hann ongantíð órógvaður av hvørki sól ella hita.

– Hita havi eg roynt áður, og sólin bilar heldur ikki ein sovorðnan dag, tá veðrið var fullkomið, sum gjørt til frælsan ítrótt. Sólin kundi órógva, um vit fingu hana í eyguni, men tá hava vit sólbrillur, sum vit eisini brúka, tá vit venja í Havn um kvøldarnar og sólin setur, sigur Heri Ziska.

**Fyrsti venjarin í 13 ár**

Til hesar leikirnar hevur Heri Ziska gjørt rímiliga nógv burturúr venjingunum. Eitt nú hevur hann fingið sær nakað so sjáldsamt sum ein venjara.

– Venjarin er tann fyrsti hjá mær síðani 1994, og tá eg eri sjálvlærdur í hamarkasti, roynir hann nú at læra meg ein øðrvísi teknikk, greiðir Heri Ziska frá. Hesin teknikkur skal ætlandi koma honum til góðar á oyggjaleikunum í 2009.

– Tá skal eg upp um hasar 50 metrarnar. Eg veit at eg kann tað, og havi evnini til tað, so uttan skaðar átti tað at borið til, heldur Heri Ziska.

# Jóan Karl akkurát ov stuttur

**Tað rakk akkurát ikki til eitt finalupláss hjá unga kollfirðinginum, sum rann 800 metrar upp á 2 minuttir og 1 sekund í gjár**

**RENNING**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Jóan Carl Joensen kom um málið við tíðini 2,01*

*Mynd: Rólant Waag Dam*

Jóan Carl Joensen var rættiliga misnøgdur, tá hann kom um málstrikuna eftir 800 metra renningina á Kallipateira-leikvøllinum tætt við Rhodos-bý.

– Tað byrjaði væl hjá mær, men endin gekk ikki sum hann skuldi, staðfesti 20 ára gamli kollfirðingurin, eftir at hann hevði fingið ondina aftur. Jóan Karl hevur annars ein rættiliga góðan endaspurt, men hesin munaði ikki tað hann plagar. Hví visti Jóan Karl ikki at siga – um tað vóru hinir, sum vóru eins sterkir og hann í hesum, ella spurturin bara ikki riggaði sum hann skuldi.

### Stórur spenningur leingi

Men hóast tað ikki gekk heilt sum Jóan Karl hevði ætlað, so var kortini stórur spenningur rættiliga leingi, um báðir hansara minuttir og eina sekundi var nóg mikið, at tryggja honum sess í finaluni.

Kappast varð í trimum bólkum, har tveir teir fremstu komu beinleiðis víðari í finaluna. Síðani vóru tvey pláss latin teimum báðum, sum høvdu bestu tíðirnar aftaná teimum, sum tryggjaðu sær beinleiðis luttøku. Her varð leingið roknað og spælt við tølum og tíðum, áðrenn dómararnir komu til tað niðurstøðu, at Jóan Karl var akkurát ov stuttur til at fáa sess í finaluni. Hann hevði triðbestu tíðina av hesum.

# Bjørk kann vera nøgd

**Bjørk Herup Olsen var bara trý sekund frá síni bestu tíð, tá hon rann 1500 metrar sunnudagin og endaði sum nummar 10**

**RENNING**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Unga Bjørk Herup Olsen kom á mál við tíðini 4 minuttir og 54 sekund, tá hon hevði lagt 1500 metrar aftur um bak á leikvøllinum á Kallipateira skamt uttan fyri Rhodos-bý. Henda tíðin rakk til eitt tíggjunda pláss av, og hóast hetta ikki er ein plasering havnardaman er von við, so kann Bjørk Herup Olsen bara vera vælnøgd við sítt avrik.

Tað er nevniliga so, at besta tíð hennara áður er 4 minuttir og 51 sekund, og undir givnu umstøðum á Rhodos, er tað eitt frálíkt úrslit hjá unga rennaranum úr Havn.



*Bjørk Herup Olsen kom um málstrikuna við tíðini 4,54*

*Mynd: Álvur Haraldsen*